# Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð
# Bygdarráðsfundur  tann 1. juni 2023, kl. 17.00

Áðrenn fundin greiddi Bjørg á Rógvi, borgarstjóri, frá, at síðani skráin varð løgd, er eitt nýtt mál innkomið. Borgarstjórin heitti á bygdarráðið um at loyva, at málið verður sett á skrá. Eitt samt bygdarráð gekk áheitanini á møti. Málið verður sett á skrá sum mál nr. 194.

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 187**
Ársroknskapurin hjá Vestmanna Kommunu fyri 2022.
J.nr. 32002-2-2023

**Viðv. 187**
Á fundinum skeyt Bjørg á Rógvi, borgarstjóri, upp at samtykkja ársroknskapin fyri Vestmanna Kommunu fyri 2022.

Uppskotið hjá Bjørg á Rógvi, borgarstjóra, varð einmælt samtykt.

**Mál 188**
Útbygging av kirkjugarðinum á Knúgvum
J.nr.: 431002-2-2023

Trivnaðar- og umhvørvisnevndin viðgjørdi á fundi tann 22. mai 2023 mál um útbygging av kirkjugarðinum á Knúgvum.

Verk.fo hevði í teldupostið dagf. 01. mai 2023 sent nevndini tvey uppskot til útbygging av kirkjugarðinum á Knúgvum at takað støðu til.

- Uppskot A hevur 196 gravir – kostnaðarmeting kr. 4.647.066,7
- Uppskot B hevur 178 gravir – kostnaðarmeting kr. 3.925.500,0

Á fundinum skeyt Sára Jógvansdóttir upp, at trøini verða tikin niður og at gøtan verður flutt suðureftir, soleiðis at kommunan fær pláss fyri fleiri grøvum.
Nevndin samtykti einmælt uppskotið hjá Sáru Jógvansdóttir.

Trivnaðar- og umhvørvisnevndin samtykti einmælt at mæla Bygdarráðnum til at velja uppskot B við broytingaruppskotinum hjá Sáru Jógvansdóttir.

**Viðv. 188**

Tilmæli frá Trivnaðar- og umhvørvisnevndini varð einmælt samtykt.

**Mál 189**
Reglugerð fyri flogfenaðhald
J.nr.: 900002-1-2023

Trivnaðar- og umhvørvisnevndin viðgjørdi á fundi tann 23. mai 2023 mál um reglugerð fyri flogfenaðhald í Vestmanna.

Nevndin mælir til at samtykkja reglugerðina.

**Viðv. 189**
Á fundinum skeyt Ingi Olsen upp at broyta grein 3, stk. 6, til klokkan 07:00.

Tilmæli frá Trivnaðar- og umhvørvisnevndini varð einmælt samtykt við broytingaruppskotinum hjá Inga Olsen.

**Mál 190**
Umvæling av neystum niðanfyri John'sa handil
J.nr.: 8211002-1-2023

Trivnaðar- og umhvørvisnevndin viðgjørdi á fundi tann 23. mai 2023 mál um umvæling av neystum niðanfyri John'sa handil, matr.nr. 187d.

Kr. 250.000 eru settar av til Gjógvaráætlanina. Ein leystlig meting dagf. 22. mai 2023 frá Juleif Durhuus til at seta tvey neyst í stand er kr. 250.000-300.000.
Talan er um tey neystini, sum standa tættast við John'sa handli.

Nevndin mælir til, at neystini verða sett í stand innan játtanarkarmin á kr. 250.000.

**Viðv. 190**
Tilmæli frá Trivnaðar- og umhvørvisnevndini varð einmælt samtykt.

**Mál 191**
Umsókn um loyvi at gera parkeringspláss
J.nr.: 10000042-7-2023

Tekniska Nevnd viðgjørdi á fundi tann 23. mai 2023 umsókn frá Ólavi Hauritz um loyvi at gera parkeringspláss omanfyri húsini á matr. nr. 128m, Garðavegur 11.
Nevndin mælir til at ganga umsóknini á møti.

**Viðv. 191**
Tilmæli frá Teknisku Nevnd varð einmælt samtykt.

**Mál 192**
Áheitan um loyvi at gera frítíðarøki í svinginum ímillum Rógvuveg og Byrgisveg.
J.nr.: 403002-1-2023

Tekniska Nevnd viðgjørdi á fundi 23. mai 2023 áheitan frá Jákup Suna Andreasen og Sámal Joensen um loyvi til at gera frítíðarøki í svinginum ímillum Rógvuveg og Byrgisveg.

Nevndin mælir til at ganga umsóknini á møti soleiðis, at økið verður skipað í samráð við kommununa og at tað, sum verður gjørt á økinum, ikki er til ampa fyri ferðsluna.

**Viðv. 192**
Tilmæli frá Teknisku Nevnd varð einmælt samtykt.

**Mál 193**
Uppskot frá Umhvørvisstovuni til góðkenning av royndarverkætlan hjá Minesto til viðmerkingar.
J.nr.: 905002-1-2023

Havnanevndin viðgjørdi á fundi tann 24. mai 2023 uppskot frá Umhvørvisstovuni til góðkenning av royndarverkætlan hjá Minesto at framleiða el við sjóvarfalsorku í Vestmannasundi.

Mett verður, at royndarverkætlanin kemur at hava ávirkan á siglingina inn á Vestmanna, um tað ikki verður loyvt at sigla ígjøgnum kassan.

Nevndin mælir tí til hesa viðmerking til uppskotið: at dýpið niður á drekan, tá hesin hongur stillur í kyrrindum, verður minst 12 metrar, og at kassin verður opin fyri allari sigling.

**Viðv. 193**
John Zachariassen skeyt upp at leggja afturat tilmælinum frá Havnanevndini, at við hesi verkætlan missa borgarar í Vestmanna kommunu eitt fiskimið afturat tí, sum longu er mist uttanfyri Fútaklett, Suðuri í Bug - sum er framhald av øðrum, ið borgarar hava mist til orku útbyggingar.

Uppskotið hjá John Zachariassen varð einmælt samtykt.

**Mál 194**
Reglugerð um gjald fyri byggiloyvir
J.nr.: 234002-2-2023

Vestmanna Kommuna hevur fingið umsókn frá SEV um loyvi til at fara undir pumpuverkætlanina Mýruverkið II.
Neyðugt verður hjá kommununi at leita sær uttanhýsis tekniska ráðgeving til viðgerð av verkætlanini.

Fyri at kunna krevja gjald fyri viðgerðina av umsóknini – bæði hesi og umsóknum um byggiloyvi yvirhøvur – er sambært umhvørvismálaráðnum neyðugt at gera eina reglugerð hesum viðvíkjandi. Ásetingarnar um gjald fyri byggiloyvir eru í grein 2 í kunngerðini um bygningskunngerð 2017. Sambært hesi grein skal landsstýrisfólkið góðkenna eina slíka reglugerð.

Tekniska deild hevur gjørt uppskot til eina slíka reglugerð. Løgfrøðingur hevur kannað uppskotið og við onkrari smávegis broyting sagt gott fyri uppskotinum.

Uppskotið verður hervið lagt fyri Bygdarráðið til góðkenningar.

**Viðv. 194**
Uppskotið frá umsitingini varð einmælt samtykt.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 18:35

Sign.:

Bjørg á Røgvi Sára Jógvansdóttir Eyðun Hansen

Laila Haldansen Anja Haldansen Ingi Olsen John Zachariassen